KLAKSVÍKAR KOMMUNA

# MIÐLAN

APRÍL 2007



Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri

## Ein kommuna í støðugari menning

Fortreytirnar fyri at reka kommunu í Føroyum broytast alsamt. Landið ynskir, at kommunurnar taka sær av støðugt fleiri málsøkjum. Og globaliseringin ger, at vit mugu hava karmar, sum ungdómurin er nøgdur við; bæði á mentanarliga og vinnuliga økinum. Haruafturat hevur Norðoyatunnilin havt við sær, at Klaksvík knappliga hevur ein annan geografiskan veruleika. Hetta setur stór fyrisitingarlig krøv til kommununa. Og eg ivist ikki í, at Miðlan fær stóran týdning sum bindilið millum borgara og umsiting.

Miðlan fer at virka sum ein gluggi inneftir í Klaksvíkar Kommunu, har ein skjótari fær eygað á tænastur og møguleikar. Endamálið er, at Miðlan skal hava eitt so gott samskifti við borgaran og vinnuna, sum yvirhøvur gjørligt. Men, vónandi fær kommunan eisini eitt enn betri samband við brúkaran. Tann partin meta vit hava stóran týdning fyri, hvussu gott vit kunnu gera okkara arbeiði.

Sum borgarstjóri fegnist eg um, at Miðlan er sett á stovn. Í høvuðsheitum fer tað at hava tvær hepnar avleiðingar. Borgarin kann fáa flest øll síni viðurskifti við kommununa avgreidd á einum og sama stað. Og umsitingin í Klaksvíkar Kommunu fær miðsavnað sínar avgreiðslur og tænastur, so samskiftið við borgaran verður meira skipað.

Miðlan er í niðastu hædd í býráðshúsinum. Tað er eitt sera atkomiligt stað í býnum, og væl ber til at støkka inn á gólvið við sínum ørindum. Mín vón skal vera, at allir borgarar í Klaksvíkar Kommunu taka væl ímóti Miðlan, og gera nýtslu av hesum nýggja tilboði.



# MIÐLAN eitt nýtt tilboð

**Mánadagurin 16. apríl er ein serligur dagur í Klaksvík. Tí tá letur nýggja kunningartænastan hjá Klaksvíkar Kommunu dyrnar upp fyri fyrstu ferð. Talan er um eitt nýskapandi tiltak, sum samskipar fakligu vitanina í kommununi á einum og sama stað.**

### Nýggjar tíðir

Tað skal ikki longur vera eitt dagsverk at fáa hendur á einari umsókn; ei heldur skal tað vera neyðugt at bíða, til rætti persónurin er at hitta. Miðlan er ein dagføring av Klaksvíkar Kommunu. Hon skal kunna liva upp til tey krøv, sum fólk seta einari nútímans kommunalari fyrisiting ár 2007.

### Borgarin greið boð og lættari arbeiðsgongd

Borgarin í Klaksvíkar Kommunu fær stórt gagn av nýggja kunningardiskinum. Men eisini kommunan sjálv kann fegnast um einfaldari arbeiðsgongdir. Kommunala starvsfólkið við servitan verður í nógv størri mun loyst frá tíðarkrevjandi kundaavgreiðslum. Og harvið kann størri orka leggjast í veruliga arbeiðssetningin. Hetta kann lata seg gera, tí Miðlan er væl kunnað og kann virka sjálvstøðugt.

So, nýggja tænastan verður væntandi góð fyri allar partar.
















# ALMENN MÓTTØKA

**Í samband við at vit lata upp 16. apríl, verður almenn móttøka í Býráðshúsunum kl. 13.00.**

**Borgarstjórin flytir fram stutta røðu og eisini fer leiðarin fyri Miðlan, Jóhann Lützen, at siga nøkur orð.**

Høvið verður hjá øllum at hyggja inn á gólvið og síggja nýggju umstøðurnar, sum Miðlan kemur at virka undir og at heilsa uppá starvsfólkini í Miðlan. Eisini verður eitthvørt lætt til matnað og okkurt leskiligt omaná. Børnini fáa sodavatn og ballónir.





VÆLKOMIN

# NÝGGJAR TÍÐIR

## UPPLATINGAR TÍÐIR

Miðlan hevur opið mánadag til fríggjadag frá kl. 10.00 til 16.00.

## SAMBAND

Vit halda til í Býráðshúsunum
N. Pálsgøta 32, FO-700 Klaksvík
Tel. 41 00 00
Fax. 41 00 01
E-postur: klaksvik@klaksvik.fo

## HEIMASÍÐA

Í samband við at Miðlan letur upp hevur Klaksvíkar kommuna dagført heimasíðuna og eisini er sniðið nakað broytt. Á www.klaksvik.fo ber til at fáa svar og kunning um mangt og hvat.



Livandi listaumhvørvið hevur stóran týdning fyri mentanina í Klaksvíkar Kommunu og økir um trivnaðin á staðnum. Hesum vil kommunan fjálga og nøra um við skiftandi framsýningum í Miðlan. Í løtuni verða hølini prýdd við eyðkendu málningunum hjá Edward Fuglø. Men annars skifta framsýningarnar annanhvønn mánað.

## LIST Í MIÐLAN

## Nýggj heimasíða





Guðrun Árting Rubeksen vann navnakappingina millum 82 innkomin uppskot úr øllum landinum

VINNARIN

### Anfinnur Johansen, málfrøðingur

## Viðmerkingar til navni Miðlan

Navnið er frálíkt, einasti bágin er, at tað kanska málsliga ikki fer at verða rætt handfarið. Í Havn er ein hárfríðkanarstova, sum ber navnið "Fríðkan", sum átti at verið bent eins og "Miðlan", t.e. "Fríðkan" í hvør-, hvønn- og hvørjumfalli og "Fríðkanar" í hvørsfalli, men tað eru heilt nógv, sum benda tað skeivt, t.e. tey siga "eg fari oman í Fríðkuna", t.e. tað verður bent bundið, men óbundið átti navnið at verið "Fríðka" og havt somu bending sum t.d. orðið genta.

Vandi kann verða fyri, at "Miðlan" fer at verða bend á henda hátt, men navnið er óbundið og eigur helst at verða bent óbundið, t.e. "Miðlan" í hvør-, hvønn- og hvørjumfalli. Hvørfall: "Miðlan er opin gerandisdagar kl.10.00", hvønnfall: "eg fari oman í Miðlan í dag", hvørjumfall: "eg var í Miðlan í dag", .

Verður tað nýtt bundið, er bendingin í hvørfalli "Miðlanin", hvønnfalli: "Miðlanina" og hvørjumfalli: "Miðlanini", men nýtið "Miðlan" óbundið í hvør-, hvønn- og hvørjumfalli.



## LIST Í MIÐLAN

Fyrsta listaframsýningin í Miðlan verður málningalist eftir Eward Fugløy, sum síðan 1991 hevur arbeitt við list burturav. 42 ára gamli listamaðurin vann Barnabókavirðislønn Norðurlandaráðsins í 2001. Og annars er hann eitt tað mest nýskapandi og markleysa listafólkið, sum vit hava í Føroyum.
Edward Fugløy framsýningin inniheldur fimm listarverk, sum júst hava verið sýnd fram í Íslandi. Edward sat eisini í dómsnevndini, sum tók støðu til navnauppskotini til nýggja kunningardiskin.

.

## STARVSFÓLKIÐ Í MIÐLAN

Jóhann Lützen
Margret Joensen
Hans Jacob Heinesen
Ingi Olsen

### Jóhann Lützen, leiðari í Miðlan

## Samskiftið verður nógv betri

Á sosiala økinum fær borgarin neyva og greiða kunning um stovnspláss til børn, gomul, og fólk við serligum tørvi, møguleikar á skúlaøkinum og frítíðartilboð til ung og gomul. Stuðulsmøguleikar innan mentan og sosial viðurskifti, o.a. Eisini er brúkarin vælkomin at vísa á tørv, sum enn ikki er nøktaður. Sosiala tænastan hevur sum endamál, at skapa tær best møguligu fyritreytirnar fyri trivnað og menning hjá øllum borgarum í Klaksvíkar Kommunu.

Eisini tekniska fyrisitingin, ið fevnir um Teknisku Deild og Byggideildina, fegnast um broyttu tænastumøguleikarnar. Tekniska fyrisitingin heldur tað vera sera umráðandi, at fáa ment samskiftið við borgaran enn meira. Og tí vilja tey fegin verða við at menna nýggju avgreiðsluna.

Miðlan fer at vera bindiliðið millum fyrisiting og borgara. Nýggi bygnaðurin fer at hava fleiri og meira vælvirkandi samskiftismøguleikar við sær. Fólk skulu heilt einfalt fáa svar uppá teirra spurningar. Vit skulu verða dugnaligari at kunna um gongdina í kommununi og at vísa á nýggjar møguleikar og viðurskifti av týdningi. Her verður heimasíðan eitt týdningarmikið amboð. Kunningarparturin á klaksvik.fo skal áhaldandi mennast og betrast til gagns fyri borgaran. Hinvegin skal telefontænastan eisini vera vælvirkandi. Og brúkarin er altíð vælkomin at støkka inn á gólvið.



Stephanssnons Hús

KLAKSVÍKAR KOMMUNA

# MIÐLAN

*hevur svarið*

# MIÐLAN SKAL VERÐA NÝGGJA SNÚÐNINGSPUNKTIÐ

## 1 Kunning

Klaksvíkar Kommuna ynskir við Miðlan at hækka um kunningar- og tæn-astustøðið, so borgarin og vinnulívið kunnu kenna seg trygg við kommunalu tænasturnar. Vit vilja menna samskiftið og skapa størri álit millum okkum og brúkaran, so tað framhaldandi kann vera gott at liva og virka á plássinum.

## 2 Greið boð

Høvuðsendamálið við Miðlan, er at gera mannagongdirnar einfaldar og týðiligar. Og harvið beina misskiljingar av vegnum, tá boð verða givin borgaranum. Upplýsingin skal vera so greið og eftirfarandi, sum yvirhøvur gjørligt.

## 3 Skjóta avgreiðslu

Nýggju mannagongdirnar fara at hava við sær, at fyrispurningar verða skjótt avgreiddir. Og neyvari.

## 4 Styttir um bíðirøðir

Starvsfólkini fara at vera væl kunnaði um flest øll kommunal mál. Og avgreiðslan verður skipað sum ein vælvirkandi eind. Tí verða svar- og bíðitíð nógv styttri enn fyrr.

## 5 At tæna sum best

Miðjað verður ímóti, at tænastan verður so fjøltáttað, sum til ber.
Tí verða veitingarnar hjá Miðlan mentar soleiðis, at tær hóska til mongu tørvir borgarans.

## 6 Á góðum stað mitt í býnum

Miðlan er í niðastu hædd í Býráðshúsinum í Nólsoyar Pálsgøtu. Vit eru í lívæðrini í býnum, her nógv fólk er til gongu. So, tað er bara at støkka inn á gólvið til eitt prát, um tú hevur okkurt spyrja um. Eisini eru parkeringsviðurskiftini góð niðanfyri á Varpimum.